ítróttur

Nr. 210 • mikudagur • 5. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Brak í Vestmanna



Ion í Íslandi

Íslendska Fram, sum er at meta sum serfrøðingar í niðurflytingarstríðnum, hevur gjørt trý ára sáttmála við fyrrverandi HB og B36 venjaran

VENJARI
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Fimm ár á rað hevur Fram á seinasta leikdegi bjargað tilveruni í fremstu íslendsku deildini. Tað í sjálvum sær líkist einum bragdi, sum sjálvt Skála helst fær trupulleikar við at gera eftir, men í felagnum ætla tey ikki, at hetta eisini skal verða søgan framyvir.

Um trý ár ætla teir sær at verða partur av oddastríðnum í Íslandi, og felagið metir seg eisini hava funnið venjaran, sum kann hjálpa teimum í hesum. Talan er um Ion Geolgau, sum vit her í Føroyum best kenna frá tíðini sum venjari hjá HB og B36.

Á heimasíðuni hjá Fram sigur Ion, at í hansara eygum hevur Fram allar møguleikar at lyfta seg væl upp á íslendsku stigatalvuni, og at hann er ivaleysur í, at hetta eisini skal bera til við sær við stýrisvølin.

Stórdystur verður í Vestmanna mikudagin, tá VÍF skal royna at venda tungu gongdini, sum hevur hótt liðið seinastu dystirnar. Og uppgávan verður neyvan størri enn tað sama, tá Kyndil kemur á vitjan. Her er talan um sonnu risarnar í føroyskum manshondbólti. Kyndil tykist eisini eftir nøkur heldur sløk ár at hava reist seg aftur, og í løtuni eru teir á odda í bestu mansdeildini.

Kyndil er tó ikki einsamalt oddalið, tí grannarnir úr Neistanum hanga eisini í. Teir skulu mikukvøldi spæla móti KÍF, og so er spurningurin, hvørt tvey stig aftur fáast til høldar í hesum dystinum.

Eisini hjá kvinnunum er ein dystur í Vestmanna, og eins og hjá monnunum er tað Kyndil sum vitjar hjá VÍF.

-jm

Dystir mikukvøldið:

1. deild kvinnur
18.30 VÍF-Kyndil

1. deild menn
20.00 VÍF-Kyndil
20.00 Neistin-KÍF

Molde slapp við skrekkinum

Stórur dramatikkur var í Noregi, tá ið Tromsø í yvirtíðini í síðsta umfarinum skoraði sigursmálið á útivølli ímóti Rosenborg. Harvið broyttist alt í sambandi við niðurflytingina

NOREG
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Síðsta umfarið er spælt í tippuliguni í Noregi. Harvið er landskappingin liðug. Jákup Mikkelsen var fyrrapartin av kappingarárinum partur av liðnum hjá Molde. Hann var einasti føroyski spælarin í Noregi. Í løtuni bendir einki á, at nakar føroyskur spælari fer at vera partur av norsku landskappingini næsta ár. Harvið tykist eitt tíðarskeið at vera liðugt, sum tók seg upp, tá ið Julian Johnsson í januar í 1998 fór til Kongsvinger at spæla. Seinni var hann í Sogndal, har Hans Fróði Hansen og Kurt Mørkøre vóru liðfelagar hjá honum. Í 2001 var eingin teirra eftir í Sogndal. Tá var tað, at Jákup Mikkelsen flutti úr Herfølge og til Molde. Í summar flutti hann til Skotlands, og nú tykist tað altso at verða soleiðis, at eingin føroyingur fer at spæla í Noregi næsta kappingarár.

Tá ið hetta er sagt, so skal leggjast afturat, at Molde hevur havt fleiri føroyingar til royndarvenjingar. Eitt nú hava fleiri KÍ spælarar verið í sambandi við Molde, men higartil er einki ítøkiligt komið burturúr. Spælararnar, sum tað verður sipað til, eru Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør og Ovi Nysted.

Molde hevur annars síðani summarsteðgin verið illa statt, og undan síðsta umfarinum var møguleiki fyri – um tað hevði viljað heilt illa til – at Molde skuldi flyta niður. Tað er langt frá støðuni í fjør, tá ið teir vunnu silvurkrónurnar. Men Molde slapp við skrekkinum. Í síðsta umfarinum vóru teir í Sogndal, har teir vunnu 3–2. Harvið lyftu teir sær fram á sætta aftasta plássið. Undan síðsta umfarinum hevði veteranurin Trond Strande givið liðfelagunum av grovfiluni fyri, at teir høvdu verið og dovnir, tá ið Molde í næstsíðsta umfarinum á heimavølli hevði tapt 2–1 ímóti Viking Stavanger. Eftir sigurin í Sogndal segði hann seg vera fegnan um, at hann hevði verið rísin, tí í Sogndal vísti Molde sannan stríðsvilja.

Lyn, sum NSÍ í august spældi ímóti í UEFA Cup kappingini, endaði fimti aftast. Í síðsta umfarinum taptu teir 3–0 á heimavølli ímóti Lillestrøm, sum fekk betri endastøðu, enn teir hava megnað seinastu árini. Men tað er framvegis langt til gamla meistaraliðið Lillestrøm.

Drama í botninum

Undan síðsta umfarinum bendi alt á, at Tromsø skuldi verða annað liðið, sum fór at flyta beinleiðis niður í næstbestu deildina. Undan vitjanini í Trándheimi vóru teir undir strikuni, og tað varð mett lítið sannlíkt, at teir skuldu megna at fáa stig og vinna á Lerkendal ímóti Rosenborg. Men tað var júst soleiðis, at tað tók seg upp. Tromsø vann, og teir skoraðu einasta málið, tá ið seinna umfarið var næstan 48 minuttir gamalt. Harvið lyfti Tromsø sær upp á fjórða aftasta plássið.

Hetta var fyrsta ferðin í 38 dystum í landskappingini, at Rosenborg fór av vøllinum, uttan at tað hevði eydnast teimum at skjóta mál. Rosenborg hevði fyri einum seks vikum síðani tryggjað sær meistaraskapin, sum teir alt árið hava ligið til at vinna. Men í leiðsluni í felagnum vóru teir í øðini inn á, at spælararnir ikki skuldu vísa størri stríðsvilja, og harvið geva til kennar, at teir kanska í hugburði vóru farnir í vetrarfrí.

Aalesund hevði heimavøll ímóti Bryne. Heimaliðið vann 2–0, men tað hjálpti ikki. Eftir eitt ár í bestu deildini flytir Aalesund niður aftur. Hitt niðurflytaraliðið er Bryne, sum legði rygg til 2–0 tapið í Aalesund.

Leikárið hjá Vålerengen verður longt, eftir at teir taptu 3–1 í Brann.

Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)
1 vika kr. 500,-
2 vikur kr. 750,-
til freistin at søkja er úti: kr. 1.000,-

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)
1 vika kr. 750,-
2 vikur kr. 1.000,-
til freistin at søkja er úti: kr. 1.250,-

2 lýsingar = -20% í avsláttri
3 ella fleiri = -30% í avsláttri

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

ÚTBJÓÐING

Vegna Fámjins kommunu, verður arbeiðið uppá gerð av vegi, kloakk v.m. boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- 190 m av vegi við tilhoyrandi installatiónum
- Regulering av 600 m2 vegi/lendi.
- Umleið 1000 m av kloakk.
- 6 x 8 m hús.
- Ymisk jørðarbeiði

Útbjóðingartilfarið skal bíleggjast hjá HMP-Consult Sp/f innan mikudagin 12. november, og verður útflýggjað móti eini kvittan um, at veðhald á kr. 3.000,00 er sett á konto nr. 9181-140.518.9 í Føroya Sparikassa.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva, merkt "Tilboð" skulu vera Fámjins kommunu í hendi í seinasta lagi **hósdagin 04. desember kl. 14.00**, tá ið lisitatiónin verður.

Veðhaldið fæst aftur, um útboðstilfarið verður latið óskalað inn aftur í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina.

RÁDG. VERKFR. HMP CONSULT Sp/f,
Óluvugøta 12 • FO-100 Tórshavn.
Telefon 312279 • Telefax 318346,
Teldupostur hmp@hmp-consult.com

hmp CONSULT VERKFRØÐIRÁÐGEVING

www.sosialurin.fo

LB SERVICE
Sveisiarbeiði
Alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og aluminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði
LB-Service
v/Lars Bisgaard
tel 422127 / 220957
Sosialurin 341800

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 211723 · Fax 321722
Sosialurin 341800

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Tofta skúli

Vegna barnsburðarfarloyvir verður søkt eftir 2 lærarum til Tofta skúla. Størvini, sum eru fulltíðarstørv, eru tíðaravmarkað til tíðarskeiðið frá 1. januar 2004 til 30. juni 2004.

Tímatalvurnar hjá lærarunum síggja soleiðis út:

1) Flokslærari í 1. flokki, og undirvísir 1. flokki í føroyskum, ítrótti, sangi og heimstaðarlæru, 5. flokki í heimkunnleika, evning og sangi, og 8. flokki í lívfrøði. Harumframt eru nakrir stuðulstímar.

2) Flokslærari í 5. flokki, og undirvísir 5. flokki í føroyskum, ítrótti og náttúru/tøkni, og 9. flokki í rokning. Harumframt eru nakrir stuðulstímar.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. november 2003.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at tosa við skúlaleiðaran, tlf. 447332.

Skúlastýrið fyri Tofta skúla
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

Citroën Berlingo 2.0 HDi (Diesel)

Árg. 04/2001 koyrt 28.000 km.
Biluri, ið er sera væl viðfarin, hevur 15" alu felgur, myrkt tónaðar rútar aftan, tokulyktur framman og mangt annað.
Eykasett av felgum við píkadekkum fylgir eisini við. Til sølu fyri kr. 150.000,-
Áhugað kunnu ringja á 228148 ella 321448 eftir kl 18.

Línuskip til sølu

Um hóskandi boð fæst er línuskipið M/S Kvikk til sølu.

Boð kunnu eisini gevast uppá P/F Kvikk.

Felagið tilskilar sær rætt til at velja millum tilboðini ella onki at taka.

P/F Kvikk
Box 258 · 700 Klaksvík · Tlf. 45 75 53